

*17 1/25-parts sekund. Tað var munurin millum tríggjar teir fremstu bátarnar, tá seks-mannafør við monnum fóru um málið á varmakeldu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tað kann ikki gerast tættari

**Gongurólvur segði takk fyri seinast, og Sølmundur gav greiðar ábendingar um, at hann ætlar sær at vera við í kappingini**

6-MANNAFØR MENN

*Jóannes Hansen*

Eingin ivi var um tað. Í ongari kapping á Fuglafirði leygardagin var intensiteturin og spenningurin so stórur, sum hann var tað, tá ið 6-mannaførini við monnum kappaðust á 1500 metrum. Gongurólvur var fyrstur um málið. Harvið settu teir í Havnar Róðrarfelag seg aftur á fremsta plássið, sum grannarnir í Jarnbardi hjá Róðrarfelagnum Knørri høvdu tikið á Jóansøku.

Men talan var um framúr kapping og spenning. Á málinum var fjarstøðan millum nummar eitt og nummar trý bara 17/25 av einum sekundi!

Tað er sjáldan, at tað í sjálvum endaspurtinum skiftir so nógv. Onkra løtuna var Gongurólvur afturi á hálvum Sølmundi, so skifti og Jarnbardur var fremstur, og so var tað Gongurólvur, sum átti munin, og á málinum var so at siga eingin munur. Men tann munurin, sum var, var Gongurólvi til fyrimunar.

Avrikini tær seinastu ferðirnar hava víst, at tað ivaleyst eisini tær næstu ferðirnar fer at verða stórur spenningur um úrslitið. Sølmundur hekk eftir í startinum í Hósvík. Í øllum hinum kappingunum hevur hann verið væl við. Onga ferðina hevur hann verið so tætt at næstfremsta og fremsta plássinum, sum hann var tað leyardagin, og tað átti at givið teimum blóð á tonna undan kappingini, sum leygardagin verður á Skála.

Vinnaratíðin hjá Gongurólvi var tann næstbesta, sum nakrantíð er fyrikomin í kappingini millum 6-mannafør á Fuglafirði. Hvessingur, sum við átta FM heitum hevur vunnið fleiri meistaraskap enn nakar annar í hesi kappingini, eigur bestu vinnaratíðina. Hon stavar frá 1981 og var 7.08.50 ella hálvt triðja sekund betri enn tíðin hjá Gongurólvi, 7.11.00, var hesa ferð.

Hósvíkingar royndu seg fyri fyrstu ferð í nýggja bátinum. Hann var ikki klárur at flota fyrrenn leygarmorgunin. Teir høvdu tískil ikki vant í honum. Tað eydnaðist Hósvíkingi at vinna fyrsta stigið í hesum kappingarárinum, og leygardagin fæst at síggja, um teir fara at megna at gera nakrar skreytir í nýggja bátinum.

Strálan var greitt nummar fýra og vann harvið á Sundabátinum, sum var bragdligur í startspurtinum, men sum síðani datt longri aftur í feltið.

**Úrslit**

| | |
|---|---|
| 1 Gongurólvur | 07:11.00 |
| 2 Jarnbardur | 07:11.06 |
| 3 Sølmundur | 07:11.17 |
| 4 Strálan | 07:14.23 |
| 5 Sundabáturin | 07:19.01 |
| 6 Hósvíkingur | 07:21.00 |
| 7 Páll Fangi | 07:26.23 |
| 8 Smyril | 07:27.01 |
| 9 Stjørnan | 07:31.06 |
| 10 Lómur | 07:42.01 |
| 11 Fuglfirðingur | 07:42.22 |

# Tað sansaði at hjá Nevinum

**Hóast fjarstøðan aftur til Kvívíking var tvær bátslongdir, so sótu teir á Nevinum sum á nálum, tí tollurin hjá øðrum lærmanninum argaði**

8-MANNAFØR

*Jóannes Hansen*

Tá ið Nevið Reyða í 2001 vann FM í stórum stíli, var tað bara eina ferð, at tað kiksaði hjá teimum soleiðis, at teir í staðin fyri at vinna gjørdust nummar tvey. Kvívíkingur vann, og tað iðraðu teir seg ógvuliga nógv um umborð á Nevinum Reyða.

Leygardagin lúrdi hóttanin frá Kvívíkingi enn eina ferð. Munurin millum Nevið, sum hevur vunnið allar róðrarnar í ár, og kvívíkingar hevur ikki altíð verið so stórur, men hesa ferð var eingin ivi.

Argjabáturin sprakk avstað og legði seg á odda, men tá ið startspurturin var av, líktist feltið sær sjálvum. Nevið Reyða var fremst, og hóast Kvívíkingur eina løtu var framvið og hótti, so gjørdist oddastøðan púra greið, og á málinum var Nevið Reyða fleiri bátslongdir fremst.

Men hóast oddasessurin var tryggur, so vóru teir ikki heilt álvuligir við støðuna umborð á Nevinum Reyða. Tollurin hjá øðrum lærmanninum, Una Oknadal, loysnaði, og hevði illa vilja við, so kundi hetta havt kostað í endaspurtinum.

Tollurin loysnaði úr stokkinum undir róðrinum, og hann arbeiddi seg spakuliga uppeftir, veit fína heimasíðan hjá Klaksvíkar Róðrarfelag, krf.fo, at siga, og Uni Oknadal greiðir soleiðis frá:

- Eg fekk ikki gjørt so øgiligani nógv undir róðrinum. Kvívíkingur hótti okkum so mikið leingi, at eg tordi ikki at fara at baksast við tollin. Men eg hevði eyguni við honum, at hann ikki fór ov langt, sigur lærmaðurin, og á myndini á heimasíðuni sæst, at tollurin hevði arbeitt seg einar 2-3 centimetrar uppeftir!

Argjabáturin vann tøttu kappingina við grannarnar í Ørvi um triðja plássið.

**Úrslit**

| | |
|---|---|
| 1 Nevið Reyða | 06:53.01 |
| 2 Kvívíkingur | 06:58.19 |
| 3 Argjabáturin | 07:01.21 |
| 4 Ørvur | 07:04.11 |
| 5 Árnfirðingur | 07:13.20 |
| 6 Miðvingur | 07:19.14 |
| 7 Knørrur | 07:19.21 |

# Endiliga eydnaðist tað hjá Fípuni

**Eftir at teir tríggjar tær fyrstu ferðirnar høvdu verið næstfremstir í sera tøttum kappingum, vunnu dreingirnir úr Klaksvík góðan sigur**

5-MANNAFØR DREINGIR

*Jóannes Hansen*

Einasti báturin, sum sigraði í Fuglafirði, og sum ikki hevði smakkað sigursrákan í trimum teimum undanfarnu róðrunum, var dreingjabáturin úr Klaksvík. Og sigurin smakkaði teimum serliga væl.

Í trimum teimum fyrstu FM róðrunum høvdu teir kappast borð um borð við Sílið og Rituna. Havnardreingirnir vóru eina ferð farnir við sigrinum, og Ritan hevði vunnið tvær ferðir. Fípan Fagra hevði allar tríggjar ferðirnar verið næstfremst.

Í fjør gekk tað hampuligt hjá Fípu dreingjunum, sum tvær ferðir vóru næstfremstir og endaðu á triðja plássinum í FM kappingini. Í 2002 vann Fípan tvær tær fyrstu kappingarnar, men eingin av teimum, sum var við til at vinna í Fuglafirði, hevði roynt at vinna áður.

- Tá ið vit róðu á Jóansøku, rópti onkur til okkara, at vit høvdu vunnið. Vit lupu upp í bátinum, og tí kendist tað sum serliga stórt vónbrot, tá ið vit fingu almenna úrslitið at vita, sum segði, at tað vóru ikki við, men at tað í staðin vóru vinmenninir hjá okkum umborð á Rituni, sum høvdu vunnið. Tá ið tað ikki skuldu vera vit, so var tað gott, at tað vóru teir, men vit vóru ógvuliga vónbrotnir ta ferðina, og tí vóru vit ovurhonds fegnir, tá ið vit hesa ferð høvdu vunnið, sigur Jón Kámar Joensen, bátsformaður umborð á Fípuni Føgru.

*Nær vóru tit greiðir yvir, at tit hesa ferð høvdu vunnið?*

- Tað vóru vit, tá ið vit komu á mál. Vit fingu fínan start, og stýrimaðurin segði alla tíðina, at vit vóru fremstir. Tá ið vit vóru komnir á mál, var møguleiki hjá okkum øllum at síggja, at vit orduliga høvdu vunnið.

Allir uttan tveir umborð á Fípuni Føgru hava róð áður. Bátsformaðurin er tó tann einasti, sum er við til at manna Fípuna triðja árið á rað. Hetta er seinasta árið, at fimm av teimum sjey hava aldur at kappast við dreingjunum, og teir ætla sær at leggja nógv fyri í royndini at vinna FM. Fípan Fagra við dreingjamanning hevur ongantíð vunnið FM, síðani tað í 1973 varð farið at kappast eftir leistinum, sum síðani tá hevur verið galdandi.

Ungu klaksvíkingarnir, sum nú stríðast fyrst og fremst við teir í Hvannasundi og Norðdepli og teir umborð á Sílinum um FM, eru John Reid Ziska, Eli Mikkelsen, Evald Johannesen, Bárður Venned, Jón Syderbø, Jón Kámar Joensen og Jón Mørkøre.

Tað togaðist um eina hálva bátslongd ímillum allar teir seks fremstu bátarnar, meðan Dúgvan var orduliga aftast. Hinir vóru Fípan Fagra, Ritan, Sílið, Blikur, Drekin og Tjaldrið.

**Úrslit**

| | |
|---|---|
| 1 Fípan Fagra | 04:56.03 |
| 2 Ritan | 04:58.16 |
| 3 Sílið | 05:00.00 |
| 4 Blikur | 05:02.12 |
| 5 Drekin | 05:04.02 |
| 6 Tjaldrið | 05:05.22 |
| 7 Dúgvan | 05:40.18 |



*Fípan Fagra hevði hesaferð munin í dreingjaróðrinum, har veruligur spenningur er í gullstríðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*